Eysturkommuna

# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 25.05.2023 kl. 17:00 |
| **Málnr.:** | |
| Nevndarlimir: | Per Martin Gregersen<br>Katrin Kjartansdóttir<br>Magnus Skoralíð<br>Marjun Andreasardóttir<br>Rúni Justinussen<br>Marita Klein Joensen<br>Petur Súni Jacobsen<br>Hjalti Dalheim<br>Hanna Jensen |
| Varalimir: | |
| Ikki møtt: | |
| Nevndarskrivari: | Erik Lervig |

Katrin Kjartansdóttir var ikki við í viðgerðini av málunum: 23/00087, 23/00192, 23/00237 og 23/00238


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Mál til viðgerðar:** | | | |
| 32/23 | 23/00245-1 | Nýtt grasllíki til vøllin Uppi á Brekkum í Leirvík | 3 |
| 33/23 | 23/00236-1 | Hitapottar í Leirvíkar skúla matr. nr. 422a i Leirvík | 5 |
| 34/23 | 23/00110-2 | 23/00110 - Frágreiðing og tilmæli roknskapur 2022 | 7 |
| 35/23 | 23/00201-1 | Keyp av lendi í Syðrugøtu | 9 |
| 36/23 | 23/00234-1 | Umvælingar í Leirvíkar skúla matr. nr. 422a í Leirvík | 11 |
| 37/23 | 23/00246-1 | Umsókn um stuðul - Víkingur - 2023 | 13 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 38/23 | 23/00087-1 | 23/00087 - frágreiðing og tilmæli - Spæli- og trivnaðarpláss - raðfestingar 2023 | 14 |
| 39/23 | 23/00192-2 | Umsókn um øki við Gøtugjógv - Minnisvarðanevndin | 16 |
| 40/23 | 23/00237-1 | Sundurbýti av matrikli til barnagarðin Gjáa matr. nr. 13e við Gøtugjógv | 17 |
| 41/23 | 23/00238-1 | Marknaðarumskipan av matriklum á Oyruni í Norðragøtu | 18 |
| | | | |

**Mál til viðgerðar:**

## 32/23 Nýtt graslíki til vøllin Uppi á Brekkum í Leirvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 15.05.2023 | 43/23 | 23/00245-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 22.05.2023 | 36/23 | 23/00245-1 |
| 3 Býráðið | 25.05.2023 | 32/23 | 23/00245-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Tilboð er umbiðið til nýtt graslíki til vøllin í Leirvík. Verandi vøllur, ið er frá 2012, er slitin og tørvur er á at skifta hann.<br>Sí hjálagda tilboð. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Peningur er ikki settur av til endamálið og støða má tí takast til um arbeiðið skal gerast og hvar peningur skal finnast. |

| **Tilmæli** |
|---|
| |

**Mentanarnevndin 15. mai 2023**

Hana Jensen og Katrin Kjartansdóttir mæla til at vøllurin í Leirvík verður skiftur sambært hjáliggjandi tilboði.
Hjalti Dalheim tekur støðu á býráðsfundinum.

**Fíggjarnevnd 22. mai 2023**

Per Martin Gregersen og Magnus Skoralíð mæla til at taka undir við tilmælinum hjá meirlutanum í mentanarnevndini.

Hjalti Dalheim tekur støðu á býráðsfundinum

**Býráðið 25. mai 2023**

Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá meirlutanum í mentanarnevndini og fíggjarnevndini

**Atkvøður fyri:**
Per Martin Gregersen, Katrin Kjartansdóttir, Magnus Skoralíð, Marjun Andreasardóttir, Rúni Justinussen, Marita Klein Joensen, Petur Súni Jacobsen, Hanna Jensen

**Atkvøður ímóti:**
Hjalti Dalheim við tí viðmerking at so stórar íløgur eiga at ikki at koma mitt í einum fíggjarárið, men eiga at verða við í fíggjarætlanini.

## 33/23 Hitapottar í Leirvíkar skúla matr. nr. 422a i Leirvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 17.05.2023 | 13/23 | 23/00236-1 |
| 2 Mentanarnevndin | 15.05.2023 | 42/23 | 23/00236-1 |
| 3 Fíggjarnevnd | 22.05.2023 | 33/23 | 23/00236-1 |
| 4 Býráðið | 25.05.2023 | 33/23 | 23/00236-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur ætlanir um at gera eitt vælveru øki uttanfyri svimjihøllini í Leirvík.<br><br>Ætlanin er at gera eitt úti øki uttanfyri svimjihøllina har tað verður hitapottar, kaldur pottur og møguliga ein sauna.<br><br>Umsitingin hevur fingið tvær kostnaðarmetingar frá Nomatek, eina uppá 2 hitapottar, 1 kaldan pott og tilhoyrandi teknikk **(Uppskot 1)**, og eina uppá 1 hitapott, 1 kaldan pott og til hoyrandi teknikk (**Uppskot 2)**, sí viðfestu skjøl.<br><br>Til hetta krevst eitt úti øki, eitt teknikk rúm til klor- og saltsýru og sandfyltur, vatn og kloakk ið ikki er íroknað kostnaðarmetingina já Nomatek, sí viðfesta skjal (Tekning).<br><br>Mælt verður til at gera hetta og støða skal takast til um tað skal gerast uppskot 1 ella 2, hetta hevur stóran týdning fyri nýtsluna av svimjihøllini og fyri allar borgarar í Eysturkommunu og møguliga onnur. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at játta pengar til hesa verkætlan og seta hetta í gongd. |

**Mentanarnevndin 15. mai 2023**

Hanna Jensen og Katrin Kjartansdóttir taka undir við tilmælinum hjá umsitingini, men mælir til at kanna um hitapotturin kann vera størri og at verkætlanin verður lýst nærri viðv. Brúsukapasiteti, gjaldi, skápum og orkuskipan. Haraftrat mæla tær til at umhugsa í hvønn mun hendan verkætlan eigur at fylgjast við skúlaútbyggingini.
Hjalti Dalheim tekur støðu á býráðsfundinum.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 17. maj 2023**
Petur Súni Jacobsen tekur undir við tilmælinum og mælir til uppskot 2.

Magnus Skoralíð og Marjun Andreasardóttir taka støðu á býráðsfundinum.

**Fíggjarnevnd 22. mai 2023**
Per Martin Gregersen mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini, og mælir til uppskot 2.

Magnus Skoralíð og Hjalti Dalheim taka støðu á býráðsfundinum

**Býráðið 25. mai 2023**
Marjun Andreasardóttir mælir til, at verkætlanin verður tikin upp til fíggjarætlanararbeiði fyri komandi ár, heldur enn at gera eina eykajáttan, tí hetta er ikki átrokandi.

Fyrst bleiv atkvøtt um tilmæli hjá Marjun Andreasardóttir og atkvøtt bleiv soleiðis:

**Atkvøður fyri:**
Marjun Andreasardóttir, Hjalti Dalheim, Magnus Sjkoralíð, Rúni Justinussen

**Atkvøður ímóti:**
Per Martin Gregersen

**Atkvøddi blankt:**
Katrin Kjartansdóttir, Hanna Jensen, Petur Súni Jacobsen, Marita Klein Joensen

# 34/23 23/00110 - Frágreiðing og tilmæli roknskapur 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 22.05.2023 | 35/23 | 23/00110-2 |
| 2 Býráðið | 25.05.2023 | 34/23 | 23/00110-2 |

**Málslýsing:**

Víst verður til fyriliggjandi roknskap sum hevur hesi høvuðstøl (túsund kr.):

| | |
|---|---|
| Inntøkur íalt | 131.812 |
| Rakstrarútreiðslur íalt | 100.616 |
| Stuðul til rentuútreiðslur | 1.456 |
| **Úrslit áðrenn rentur og avdráttir** | **29.740** |
| Rentuútreiðslur | 714 |
| Avdráttir | 9.187 |
| **Úrslit eftir rentur og avdrátt** | **19.839** |
| **Íløgur** | **42.361** |
| **Rakstrar- løgu og útlánsætlan (RLÚ)** | **-13.335** |

Í mun til fíggjrætlanina fyri 2022 so eru rakstrarútreiðslurnar eru 100 t.kr lægri enn ætlan, ímeðan inntøkurnar eru 13,6 mió. kr hægri.

Íløgurnar eru 22 mió lægri enn ætlan. Rentuútreiðlurnar eru 250 t.kr lægri enn ætlan, og avdráttirnir eru 1,6 mió. hægri enn ætlan.

Í 2022 bleiv lán tikið á 30 mió. kr, og nettoskuldin var við árslok 43,5 mió.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli**

**Fíggjarnevnd 22. mai 2023**

Fíggjarnevndin mælir til at góðkenna fyriliggjandi roknskap

**Býráðið 25. mai 2023**

Einmælt samtykt at góðkenn fyriliggjandi roknskap.

## 35/23 Keyp av lendi í Syðrugøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 17.05.2023 | 11/23 | 23/00201-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 22.05.2023 | 30/23 | 23/00201-1 |
| 3 Býráðið | 25.05.2023 | 35/23 | 23/00201-1 |

**Málslýsing:**

Á fíggjarætlanini hjá Eysturkommunu fyri 2023 er avsettir pengar til keyp av lendi í Syðrugøtu í útstykking.

Umsitingin hevur gjørt tveir møguleikar.

Ein møguleiki eru at keypa matr. nr. 110a, 204 og 241 í Syðrugøtu svarandi til umleið 26.000 kvm, sí hjálagda skjal. (kort yvir matriklar)

Umsitingin hevur samskift við Búnaðarstovuna og festarin, um møguligt keyp av omanfyri nevndu matriklum. Hetta keypi er treyta av at kommunan letur Búnaðarstovuni øki aftur har verandi moldgoymsla er um 3 ár. Moldgoymslan er umleið 18.000 kvm og Eysturkommuna skal gjalda munin millum hesar fermetrarnar ið er umleið 8.000 kvm.

Ein annar møguleiki er at keypa matr. nr. 208 og 225 í Syðrugøtu, sí hjálagda skjal ( kort yvir matriklar)
Hetta øki er umleið 24.500 kvm, og umsitingin hevur havt samskifti við Ognarhagan, og hevur loyva kommununi at keypa hesar matriklarnar til eina útstykking.

Eingin avtala er gjørt við Búnaðarstovuna, festara ella Ognarhagan.

Til bæði økini krevst ein umskipan av býarskipanini og byggisamtyktini fyri økini.

Umsitingin mælir til at fara í samráðingar við ognarhagan um keypa matr. nr, 208 og 225 til nýggja útstykking í Syðrugøtu.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli**

Mælt verður til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 17. maj 2023**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini, umframt at fara í samráðingar við Búnaðarstovuna og festarin um matr nr. 110a, 204 og 241.

**Fíggjarnevnd 22. mai 2023**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 25. mai 2023**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini og byggi- og býarskipanarnevndini.

## 36/23 Umvælingar í Leirvíkar skúla matr. nr. 422a í Leirvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 17.05.2023 | 12/23 | 23/00234-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 22.05.2023 | 32/23 | 23/00234-1 |
| 3 Býráðið | 25.05.2023 | 36/23 | 23/00234-1 |

**Málslýsing:**

Sambært raðfestinginum hjá umsitingini er ætlanin at skifta taki á svimjihøllini og taka verandi loft burtur og opna upp til taki í skúlanum í Leirvík.

Ætlanin er at skifta tekjuna á svimjihøllini og taka takvindeyguni burtur, umframt skal veggurin millum tekjurnar klæðast og bjálvast. Inni í skúlanum er ætlanin at taka lofti niður inni í gongini við svimjihøllina, og opna upp til tróðri. Partur av loftinum í gongini er ov lágt í mun til lógarásettur krøvini til hæddirnar í rúmum sambært BK17. Ætlanin at varðveita 3 takvindeygur í gongini, gongin fer at virka meira rúmlig, ljós og innbjóðandi.

Heitt var á tríggjar arbeiðstakarar um at bjóða uppá hetta arbeiði, tveir av teimum bóru seg undan. Vit hava tískil bert fingið eitt tilboð uppá tekjuna og lofti inni í skúlanum.

Partar av arbeiðinum eru ikki boðin út, tí ivasamt er hvussu nógv av hesum skal gerast, tí hevur umsitingin gjørt eina meting av hesum arbeiðinum.

Ætlanin er, at arbeiði skal skipast soleiðis at tekjan verður skift í summar, síðan verður arbeiði innan gjørt í samstarv við skúlaleiðsluna.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli**

Umsitingin mælir til at taka av tilboðnum og metingini og seta arbeiði í gongd.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 17. maj 2023**

Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 22. mai 2023**
Fíggjarnevndini mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini

**Býráðið 25. mai 2023**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

## 37/23 Umsókn um stuðul - Víkingur - 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 15.05.2023 | 44/23 | 23/00246-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 22.05.2023 | 37/23 | 23/00246-1 |
| 3 Býráðið | 25.05.2023 | 37/23 | 23/00246-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Víkingur søkir um stuðul til rakstur fyri árið 2023. Sí hjáløgdu umsókn. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Á fíggjarætlanini fyri 2023 eru kr. 600.000,- settar av til endamálið. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at stuðul verður latin. |

**Mentanarnevndin 15. mai 2023**
Mentanarnevndin mælir til at stuðul verður latin á kr. 600.000,-

**Fíggjarnevnd 22. mai 2023**

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini

**Býráðið 25. mai 2023**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

## 38/23 23/00087 - frágreiðing og tilmæli - Spæli- og trivnaðarpláss - raðfestingar 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Umhvørvis - og trivnaðarnevndin | 15.02.2023 | 2/23 | 23/00087-1 |
| 2 Býráðið | 23.02.2023 | 14/23 | 23/00087-1 |
| 3 Umhvørvis - og trivnaðarnevndin | 20.04.2023 | 5/23 | 23/00087-1 |
| 4 Fíggjarnevnd | 24.04.2023 | 22/23 | 23/00087-1 |
| 5 Fíggjarnevnd | 22.05.2023 | 38/23 | 23/00087-1 |
| 6 Umhvørvis - og trivnaðarnevndin | 22.05.2023 | 6/23 | 23/00087-1 |
| 7 Býráðið | 25.05.2023 | 38/23 | 23/00087-1 |

**Málslýsing:**

Á fíggjarætlanini fyri 2023 hjá Eysturkommunu er avsett til íløgur kr. 1.500.000 til spæli – og trivnaðarpláss.

Eysturkommunu hevur í dag spæli – og trivnaðarpláss í flest øllum bygdunum í kommununi. Onkur av hesum er nýggj, meðan onnur er eldri, niðurslitin og ikki tíðarhóskandi.

Umsitingin hevur gjøgnumgingið nøkur av hesum plássum og gjørt eina meting av, hvat skynsamast er at gera í mun til verandi støðu á økinum.

Mælt verður til at avrigga onkur av verandi spæliplássum, sum í dag ikki er dagførd og tí ikki "forsvarlig" at hava virkin. Talan er um Eftirfylgjandi kann so støða takast til, um hesi plássini skulu raðfestast seinni og peningur setast av til at dagføra og gera hesi pláss tíðarhóskandi.

Umsitingin mælir somuleiðis til at brúka játtanina, sum avsett er á FÆ 2023 til at uppraðfesta verandi spælipláss og sparkivøll í Syðrugøtu matr.nr. 36 og verandi spælipláss og sparkivøll í Leirvík á matr.nr. 347aa. Mælt verður til at brúka kr. 750.000 á hvørjum stað.

**Ískoyti, dagf. 20. Apríl 2023**
Umsitingin hevur gjørt uppskot til nýtt spælipláss í Leirvík, sí skjal í málinum.

Harumframt er ætlanin at gera ábøtur á spæliplássi í Syðrugøtu, sí skjal í málinum.

**Ískoyti, dagf. 22. Mai 2023**
Umsitingin hevur bjóða spæliplássinum í Leirvík og Syðrugøtu út, tvey tilboð eru komin inn.

Umsitingin mælir til at taka av lægra tilboðnum sum er frá Arta og seta arbeiði í gongd.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Á fíggjarætlanini fyri 2023 er avsett kr. 1.500.000 á íløgukonto "Spæli- og trivnaðarpláss."

| Tilmæli |
|---|
| Mælt verður til at fylgja tilmælinum hjá umsitingini. |

**Umhvørvis - og trivnaðarnevndin 15. februar 2023**
Mæla til at raðfesta spæliplássini í Leirvík og Syðrugøtu, sum víst verður til í málslýsingini, men ikki at halda seg til eina ávisa upphædd til hvørt plássið.
Umsitingin kemur við uppskotið til komandi fund í Umhørvis - og trivnaðarnevndini.
Mæla somuleiðis til at avrigga spæliplássini, sum víst verður til í málslýsingini

**Býráðið 23. februar 2023**

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini, tó við tí broyting at staðsetingin í Leirvík verður á matr.nr. 389a og at eftirhyggja fylgjandi spælipláss í Syðrugøtu á matr.nr. 35k, í Norðragøtu á matr.nr. 57ah og spælipláss og sparkivøll í Leirvík á matr.nr. 347aa.

**Umhvørvis - og trivnaðarnevndin 20. apríl 2023**
Mæla til at taka undir við tilmælinum hjá umstingini, dagf. 20. apríl 2023 og at verkætlanirnar verða bjóðaðar út.

**Fíggjarnevnd 24. apríl 2023**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá umhvørvis- og trivnaðarnevndini dagf. 20. apríl 2023.

**Umhvørvis - og trivnaðarnevndin 22. mei 2023**
Mæla til at taka undir við tilmælinum hjá umstingini, dagf. 22. mei 2023.

**Fíggjarnevnd 22. mei 2023**
Mæla til at taka undir við tilmælinum hjá umhvørvis- og trivnaðarnevndini.

**Býráðið 25. mai 2023**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá umhvørvis- og trivnaðarnevndini og fíggjarnevndini

## 39/23 Umsókn um øki við Gøtugjógv - Minnisvarðanevndin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 15.05.2023 | 41/23 | 23/00192-2 |
| 2 Byggi - og býarskipanarnevnd | 22.06.2023 | | 23/00192-2 |
| 3 Býráðið | 25.05.2023 | 39/23 | 23/00192-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Minnisvarðanevndin søkir um øki at seta minnisvarða fyri sjólatin á. Søkt verður um matr. 12g við Gøtugjógv (Sí viðfesta kort). Parkeringsøki er partur av hesum matrikli og má øki til minnisvarða frámatrikulerast, heldur enn at lata allan matr. 12g. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at øki til minnisvarða verður frámatrikulerað og latið minnisvarðanevndini. |

**Mentanarnevndin 15. mai 2023**

Mentanarnevndin mælir til at ein partur av matr. 12g við Gøtugjógv verður frámatrikuleraður til minnisvarða soleiðis at parkeringsplássini tikin burturúr.

**Býráðið 25. mai 2023**

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini

## 40/23 Sundurbýti av matrikli til barnagarðin Gjáa matr. nr. 13e við Gøtugjógv

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 17.05.2023 | 14/23 | 23/00237-1 |
| 2 Býráðið | 25.05.2023 | 40/23 | 23/00237-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| **Málslýsing:**<br>Í samband við at nýggi Dagstovnurin Gjái er í gerð, er neyðugt at kommunan fremur sundurbýtið og samanlegging av matriklum við Gøtugjógv..<br><br>Matrikkulin 13e er samanlagt 14.719 m2.<br><br>Neyðugt er at gera fylgjandi:<br>• Dagstovnurin sundurbýtast til áleið 9.197 m2<br>• Vegurin Brattargøta áleið 1.665 m2<br>• Matrikkul 13w og 13x skal samanleggjast í matrikkulin til dagstovnin. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at gera sundurbýtið og samanlegging. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 17. maj 2023**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir til tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 25. mai 2023**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini

## 41/23 Marknaðarumskipan av matriklum á Oyruni í Norðragøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 17.05.2023 | 15/23 | 23/00238-1 |
| 2 Býráðið | 25.05.2023 | 41/23 | 23/00238-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur fingið áheitan frá Fiskavirkinum í Norðragøtu um at broyta leiguøki undir bygninginum á Oyruni.<br><br>Fiskavirkið liggur á 4 ymiskum matriklum og neyðugt er at rudda upp og gera tað soleiðis at Fiskavirkið kemur at liggja 100 % innanfyri á einum matrikli.<br><br>Verandi øki undir bygninginum, matr. 106c, 188b og 106d er samanlagt 6476 m2 og eftir hetta verður leiguøki áleið 5224 m2. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður at taka undir við marknaðarumskipanini og leggja matriklarnar saman. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 17. maj 2023**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 25. mai 2023**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndni.

fundurin lokin kl. 19.00

Per Martin Gregersen

Katrin Kjartansdóttir

Magnus Skoralíð

Marjun Andreasardóttir

Rúni Justinussen

Marita Klein Joensen

Petur Súni Jacobsen

Hjalti Dalheim

Hanna Jensen